Dátueftirlitið

Fíggjarmálaráðið
Tinganes
110 Tórshavn
fmr@fmr.fo

Tórshavn, tann 21. februar 2023
Málsnummar: 22/17377
Málsviðgeri: TH/BSJ

Viðvíkjandi uppskoti til løgtingslóg um um talgilda samleikakortið
Fíggjarmálaráðið hevur sent Dátueftirlitinum uppskot um talgilt samleikakort til ummælis. Dátueftirlitið hevur hesar viðmerkingar til lógaruppskotið:

Viðvíkjandi § 2
Í viðmerkingunum til § 2, stk. 1 í dátuverndarlógini[1] stendur, at loysnin verður ment eftir "*dátuvernd ígjøgnum sniðgeving.*" Í almennu viðmerkingunum til lógaruppskotið stendur, at *"brúkarin kann velja, um hann vil deila sítt p-tal ella bústað, alt eftir um hann metir, at hesar upplýsingar eru viðkomandi í einstaka førinum."* Her kundi reglan um "dátuvernd gjøgnum standardstillingar" eisini verðið skoytt uppí, har uppsetingin í útgangsstøði (default) vísir sum minst av upplýsingum.

Dátueftirlitið vil vísa á, at um ein borgari vísir sítt talgilda samleikakort fram, har t.d. p-talið sæst, men ikki verður skrásett av nøkrum, so er ikki talan um viðgerð av persónupplýsingum. Verður p-talið hinvegin skrásett, so er tann fyritøka ella myndugleiki, ið skrásetur, dátuábyrgdari, og skal tá m.a. halda reglurnar fyri viðgerð av persónstalinum, sbrt. § 16 í dátuverndarlógini.

Viðvíkjandi § 3
Sambært viðmerkingunum til § 3 er tilmeldingin til talgilda samleikakortið sjálvboðin, tað verður upplýst, at viðgerðargrundarlagið er samtykki.

Dátueftirlitið skal í tí sambandi vísa á, at dátuverndarlógin setur ávísar treytir fyri at nýta samtykki sum heimildargrundarlag. Millum annað er í § 9, stk. 3 ásett, at tað skal vera gjørligt, at taka samtykkið aftur. Ítøkiliga vil tað siga, at øll viðgerð aftaná at samtykkið er tikið aftur í útgangsstøðinum má steðga. Er viðgerðin tann, at upplýsingar hjá skrásetta verða goymdar, so eiga hesar upplýsingar at verða strikaðar um tann skrásetti tekur sítt samtykki aftur. Er hetta ikki gjørligt, kann samtykkið ikki nýtast sum viðgerðargrundarlag.

Tað eru aðrar viðgerðarheimildir enn samtykki. Tað ber sostatt til at viðgera persónupplýsingar, sjálvt um tann, sum upplýsingar eru, um ikki hevur givið samtykki. Tað er tá umráðandi at tryggja sær, at onnur heimild er fyri viðgerðini. Um tað t.d. er ásett í lóg, at viðkvæmar persónupplýsingar kunnu viðgerast, kann hetta verða grundarlagi undir viðgerðini.

Tað framgongur ikki av viðmerkingunum í lógaruppskotinum, hvat samtykkið fevnir um. Um samtykkið bert fevnir um ítøkiliga talgilda samleikakortið, so er Gjaldstovan/Talgildu Føroyar dátuábyrgdari. Fevnir samtykkið um tær tænastur, ið aðrar fyritøkur og myndugleikar bjóða fram, og sum verða tengdar at samleikakortinum, t.d. koyrikortið, so er Gjaldstovan/Talgildu Føroyar dátuviðgeri, meðan Akstovan er dátuábyrgdari.

[1] Løgtingslóg nr. 80 frá 7. juni 2020 um vernd av persónupplýsingum

Dátueftirlitið

Ein borgari kann fáa talgilt samleikakorti, um hann góðkennir ásettar "*brúkstreytir*." Tað er ikki greitt í lógaruppskotinum, hvat hesar treytir fevna um. Um treytirnar fevna um, at brúkarin skal vátta fyri at hava lisið ein tekst, ið er kunning sbrt. §§ 23 og 24 í dátuverndarlógini, so er kunningarskyldan hildin. Um teksturin eisini fevnir um treytirnar fyri samtykki sbrt. § 9 í dátuverndarlógini, so eru formiligu treytirnar fyri samtykki eisini hildnar. Um "brúkstreytirnar" ikki fevna um kunning sbrt. §§ 23 og 24 ella treytir fyri samtykkið sbrt. § 9, so skulu hesar skyldur dátuábyrgdarans haldast á annan hátt.

Viðvíkjandi § 4
Í § 4 verður upplýst, at foreldur kunnu fáa eintak av talgilda samleikakortinum hjá sínum ómyndugum børnum.

Tað er týdningarmikið at tryggja, at bert foreldur, ið sbrt. lóggávuni hava viðkomandi rættindi, kunnu fáa atknýtt samleikakorti hjá børnunum til sítt egna samleikakort.

Vegna Dátueftirlitið

Tóri Højgaard
stjóri